**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00427**<br>**Umsókn frá Rasmus N. Hansen, um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 389t í Leirvík**<br>Grunda á, at tíðin sambært skeytinum um bygging av sethúsum á matr. nr. 389t í Leirvík, ikki er yvirhildin, hevur kommunan sent fráboðan um, at grundstykkið fellur aftur til kommununa.<br><br>Rasmus N. Hansen hevur sent umsókn um framhaldandi at kunna eiga grundstykkið og umsókn um byggiloyvi.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Rasmus N. Hansen fær byggiloyvi til sethús á matr. nr. 389t í Leirvík sambært innsendu umsókn og tekningum, treyta av, at byrja verður at byggja beinanvegin.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir somuleiðis til at frávik sambært skeytinum ikki verður givið frá 1. januar 2014. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 2. | **13/00416**<br>**Umsókn frá Ova Heinesen um at keypa ískoytis-stykki umleið 130m$^2$ frá 147d at leggja til matr. nr. 179 í Leirvík**<br>Tann 25. august 2008 var umsókn frá Ova Heinesen viðgjørd í Leirvíkar kommunu. Mælt var frá at selja økið, tí at tað var ikki heimild fyri tí sambært byggisamtyktini fyri Leirvík.<br><br>Kommunan hevur móttikið nýggja umsókn um keyp av ískoytisstykki at leggja til matr. nr. 179.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Ove Heinesen fær loyvi at keypa uml. 130 m$^2$ av matr. nr. 147d at leggja til matr. nr. 179.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | | |
|---|---|---|
| **3.** | **13/00398**<br>**2. viðgerð av eykajáttan til keyp av bili til brunaumsjánarmannin.**<br>Við 1. viðgerð bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 300.000,00<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eisn sog samtykt við 1. viðgerð. | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð |
| **4.** | **13/00333**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til kort/kunningarfaldara**<br>Við 1. viðgerð bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 150.000,00<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eisn sog samtykt við 1. viðgerð. | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð |
| **5.** | **13/00031**<br>**2.viðgerð av uppskoti til nýggja kommunustýrisskipan**<br>1. viðgerðv var á býráðsfundinum tann 1. juli 2013. Tá bleiv uppskoti einmælt samtykt við ávísum broytingum. Hesar broytingar eru gjørdar í fyriliggjandi uppskoti. | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð. |
| **6.** | **13/00400**<br>**Umsókn frá G! Grunninum til at fyriskipa G! 2014**<br>Mentanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti og at peningurin - kr. 200.000 - verða settar av á fíggjarætlanini 2014, til endamálið.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum mentanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Mentunarnevndini og Fíggjarnevndini.<br><br>*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |
| **7.** | **13/00418**<br>**Umsókn um fíggjarligan stuðul til undirvísing í Keypnannahavn**<br>Mentanarnevndin mælir til at stuðla við kr. 5.000 og at peningurin verður tikin av konto nr. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

5.24.14.510 – 10 "Stuðul til mentan". Vísandi til at umsóknin fellur uttan fyri "Reglugerð um stuðul til frítíðarvirksemi í Eysturkommunu" vil mentanarnevndin leggja málið fyri býráðið til støðutakan

Fíggjarnevndin mælir frá at ganga umsóknini á møti, tí at heimild er ikki í reglugerðini fyri hesum.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Oluffa Joensen
Brandur Jacobsen
Hjalti Dalheim
Árni Jacobsen
Hanus Jacobsen
Ólavur Olsen

**Atkvøður ímóti:**
Hanna Jensen
Emma Rasmussen

Sostatt er samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini samtykt.

**8. 13/00340**

**Uttanumsøkið við vøllin og bygningin í Sarpugerði**

Uppskot er komið frá EM Ráðgeving til økið við vøllin og bygningin í Sarpugerði. Saman við uppskotinum er ein frágreiðing til økið v.m.

Á fundi í BOB tann 19. august 2013 mælir byggi- og býarskipanarnevndin til, at arbeiða víðari við uppskotinum, við atliti til sunnara partin á økinum, men tað hevur skund at fáa asfaltera økið frammanfyri sitiplássini, rundanum bygningin og til-/frákoyring frá Mortansstovubrekku.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at bjóða arbeiðið út til min.3 stórar arbeiðstakarir, og at útbjóðingartilfarið lýsir møguleika at arbeiði heldur áfram í 2014. Arbeiðstøkan verður bjóða út sum innboðin lisitatión. Arbeiðstøkan fevnir um økið rundanum bygningin og yvir til Mortanstovuvegin, grótgarð fram við lendinum, flísar og gótuljós sambært tí lægra kostnaðinum.

Fíggjarnevndin mælir til at íalt 1.650.000,00 verða nýttir til uttanumsøkið í 2013 og 2014.

Einmæll samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini, og at 1.65 mió. kr. sbrt. kostnaðarmetingini d. 09.09.13 verða nýttar í 2013 og 2014 til uttanumsøkið.
Eisini var samtykt, at leiðingar til kamping skulu leggjast og at gongubreytin við Mortanstovubrekkuna, við brúnna, skal asfalterast samstundis.

*Brandur Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanus Jacobsen og Erik Lervig vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**9. 13/00352**

**Leirvíkar skúli – um- og útbygging av skúlaplássinum í Leirvík**

Støðutakan til uppskot um- og útbygging av skúlaplássinum fyriliggur.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja fyriliggjandi ætlan.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum byggi- og býarskipanarnevndini.

**10. 13/00313**

**Umsókn um keyp av neystagrund í Norðragøtu**

Tann 25. august 2008 var umsókn um keyp av neystagrund móttikin, og var umsóknin viðgjørd á fundi í teknisku nevnd Gøtu bygdaráðsins tann 01. oktober 2008, har samtykt var, at málið var ikki búgvið til støðutakan, og var mælt til, at allir matriklarnir til neystagrundirnar frá Eltalvu-virkinum og úteftir verða dagførdir.

Allir matriklarnir til neystagrundirnar eru dagførdir í 2009 og 2010.

Við gjøgnumgongd av søguni um neystagrundir á havnalagnum og um havnalagið, er gjørd ein tilráðing til umsókninia, at selja neystagrundina matr. nr. 162 í Norðragøtu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at selja grundstykki.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**11. 13/00394**

**Friðkan av økinum omanfyri neystini í innara Bug og millum garðin hjá Jógvan Elias Joensen, Mataránna**

Jógvan Elias Joensen hevur uppskot til annað byggistig, sum er at laga framvið norðara áarbakka á Mataránni v.m. Umframt uppskotið er fyrispurningurspurningur um loyvi at gera arbeiði so sum tað er teknað.

Trivnaðarnevndin mælir til at Eysturkommuna veitir eitt fíggjarligt ískoyti áljóðandi 75.000 kr. til verkætlanina hjá Jógvan E. Joensen, og at peningurin verður settur av til fíggjarætlanina 2014.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælnum hjá trivnaðarnevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

| | | |
|---|---|---|
| 12. | **13/00402**<br>**Skriv frá Leivíkar Arbeiðarafelag um møgulig keyp av egningarmiðstøðini hjá Fofish í Leivík**<br>Fundur hevur verið millum Leirvíkar Arbeiðarafelag og Eysturkommunu. (Sí hjál. notat frá fundi við Leirvíkar arbeiðarafelag)<br><br>Minnilutin í vinnunevndini, Árni Jacobsen mælir til at Eysturkommuna er við í ætlanin, við at gera WC/brúsir og vaskirúm. Hetta skal tó í mesta lagi kosta 150.000,00. Meirlutin Brandur Jacobsen og Hanus Jacobsen mæla frá at verða við í ætlanini hjá Leirvíkar arbeiðarafelag, tí at kommunan hevur ætlanir um at gera WC/brúsir og vaskirúm við nýggja bátahylin á Toftanesi.<br><br>Meirlutin í fíggjarnevndini Jóhan Christiansen og Hjalti Dalheim mæla til at taka undir við tilmælinum hjá minnilutanum vinnunevndini, við tí treyt at tað fyriliggur ein samlað verkætlan fyri skúranar, sum kommunan kann taka undir við. Minnilutin, Brandur Jacobsen mælir til at taka undir við meirlutanum í vinnunevndini, við tí viðmerking at kommunan ikki eigur at gera íløgur í annanmans ogn. | Einmælt samtykt at útseta málið til ein seinni fund. |
| 13. | **10/00136**<br>**Bátahylurin undir Gøtueiði**<br>Støðutakan til nýtt uppskot um umbygging av bátahylinum undir Gøtueiði<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, og at arbeiðið verður boði út sum undirhondsboð.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.<br><br>*Hjalti Dalheim var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

**14. 13/00421**

**Uppskot til at stovna kommunufelag fyri allar kommunur**

Sum støðan er í dag eru tvey kommunufeløg í Føroyum (KSF og FKF) Eysturkommuna er sum kunnugt limur í KSF.

Samráðingar hava verið millum feløgini um at leggja tey saman (stovna eitt nýtt). Leiðslan í KSF hevur gjørt eitt uppskot hesum viðv., sum so skal viðgerast av øllum limakommununum. Avtala er at allar kommununar innan 1. november hava tikið støðu til uppskotið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**15. 11/00072**

**Jarðarkeyp til útstykking við Traðará í Syðrugøtu**

Fíggjarnevndin mælir til at senda Hagapartinum fyri uttan Hús umbøn um keyp av jørð svarandi 43.235 m$^2$

Einmælt samtykt at senda Hagapartinum fyri uttan Hús umbøn um keyp av jørð sambært fyriliggjandi skjali.

**16. 13/00436**

**Fíggjarætlan 2014**

1.viðgerð av fíggjarætan fyri 2014

Fíggjarnevndin hevur samtykkt at leggja fyriliggjandi uppskot fyri býráðið. Sambært hesum verða:

Samlaðu inntøkurnar 66.781.343,00 kr.
Rakstrarútreiðslunar 54.739.998,00 kr.
Íløgurnar 14.550.000,00 kr.

Rentuútreiðslunar verða 2.893.400,00.
Avdráttirnir verða 6.000.000,00

Skattaprosenti verður óbroytt 21, og barnafrádrátturin verður 5.000,00

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

**17. 13/00411**

**Vatnreinsiverk úti á Hagaleiti í Leirvík – 2013**
Støðutakan til fyriliggjandi tilboð.

Tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini fyriliggja

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum.*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini, at taka av alternativa tilboðnum frá Nomatek á kr. 1.614.325,00 uttan mvg.

Peningurin verður tikin av konto 6.30.21.511 **vatnveiting (løgujáttan)**

**18. 13/00226**

**Barnaverndarsamstarv**
Støðutakan til uppskot til samstarvssáttmála við Fuglafjarðar kommunu um barnaverndarsamstarv

Tilmæli frá fíggjarnevndini og trivnaðarnevndini fyriliggja.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum.*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og trivnaðarnevndini.

**19. 13/00000**

**Navn til nýggja stovnin á Gásamýri í Leirvík**
Støðutakan til uppskot til navn frá navnanevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ____________________

Hanna Jensen ____________________

Hanus Jacobsen ____________________

Emma Rasmussen ____________________

Hjalti Dalheim ____________________

Ólavur Olsen ____________________

Árni Jacobsen ____________________

Oluffa Joensen ____________________

Brandur Jacobsen ____________________

**Býráðsfundur mánadagin 30. september 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**